AMERIKATÚRUR 7. TIL 30. JUNI 2010

# THE LAND OF THE FREE

**NEW YORK** HØVDU FINGIÐ EINA ADRESSU Á **1. AVENUE**, HAR VIT KUNDU **LEIGA BIL** FRÁ **HERTZ**. FÓRU TIL **GONGU** OG KOMU TIL **1. AVENUE**. MEN FUNNU **ONKI** HERTZ FIRMA, **AFTANÁ** AT HAVA **GINGIÐ** Í UMLEIÐ **3 TÍMAR**



**4. PARTUR**
Albert Isfeld
post@sosialurin.fo

## Sunnudagin 13. juni

*LEIGA BIL*

Spurdu vit síðan okkum fyri á Pennsylvania Station og fingu, aftaná at hava spurt eini 3-4 persónar adressuna hjá Hertz tætt við Penn Station, sum hon verður kalla. Har stóð kvinna og tók ímóti okkum. Vit søgdu okkara ørðindi um at leiga bil. Hon segði, at vit gott kundu leiga har frá teimum, men eg mátti fyrst taka hasa gulu telefonina og ringja til høvuðskontórið í Oklahoma og bíleggja frá teimum. Spurdi kvinnuna, um hon vildi hjálpa mær við hesum, men hon lætst ikki um vón. Eg at ringja, men fekk ikki kontakt, kvinnan bara stóð og gjørdi onki. Hetta tímdu vit ikki at standa model til, so vit rýmdu sera misnøgd. Kvinnan lætst ikki um vón.

Fóru síðani til AVIS, har fryntligur maður gav okkum adressu, har vit kundu fara at bíleggja bilin.

Síðan fóru vit á matstovu á 7. Avenue, at fáa okkum okkurt at eta.

Fóru síðani til AVIS at bíleggja bilin og her gekk alt sum tað skuldi, og vit blivu væl og virðiliga avgreidd, so vit kundu koma eftir bilinum kl. 10,00 tann týsdagin tann 15.06.




Art Deco bygningur



MoMA

## Mánadagin 14. juni

*MOMA OG SHOPPINGTÚRUR*

The Museum of Modern Art bleiv stovnað í 1929, og er museum fyri nútímans list, og eisini er designlutir framsýnaðir á savninum. Íalt eru umleið 150.000 lutir á savninum, og er tað onga aðrastaðni, at so nógv av nútímans list er savnað á einum stað.

Savnið er víðka og og endurbygt í 1984 av arkitektinum Cesar Pelli, og er nú ein sera snotiligur karmur um list av hesum slag.

Uttan er bygningurin sloktur á at líta við stórum flatum í glasi og metal, og eisini eru slípaðar grótflátur. Ímillum allar teir høgu bygningarnar í hesum kvarteri, sum er ein partur av bygningsmassanum kring 5. Avenue, sýnist MoMA sum ein andsøgn í sínum egna, reina stíli og er lættur at fáa eyga á.

Innan er vítt til veggja og høgt til loftið, og eru øll rúmini í ljósum liti. Sum nakað serligt, eru allastaðni kikk út millum skýskravararnar, sum í sjálvum sær skapa rúmlig listarverk, har teir standa í ymiskum skapi just sum kubistisk verk.



Picasso

Listaverkini á savninum kenna vit frá listabókum og filmum, og finna vit her expressionistar, impressionistar, kubistar, tey abstraktu og mangt annað – og eisini síggja vit her tað onkur vil kalla »Kejserens nye klæder«.

Nevnast kann at Picasso, Van Gogh og allir teir eru her – man følir seg í góðum selskapi.

Ein vitjan her er eitt must.

## Týsdagin 15. juni

*FRÁFERÐ FRÁ NEW YORK TIL BALTIMORE*

Vit fóru sum vant tíðiliga upp og gjørdu okkum tilreiðar,